tíðinda sosialurin blaðið

FRÆLSI – JAVNAÐUR – BRØÐRALAG

67. ÁRGANGUR

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Upseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegi 26 Argjum
Telefon: 11820

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefax: 14720

Samgongumøguleikar

SAMBÆRT seinastu veljarakanningini tykist tað at fara at verða torført at fáa eina arbeiðsføra samgongu eftir valið. Hvussu vit enn royna at leggja bókstavirnar saman, so skulu nógvir flokkar til fyri at fáa meiriluta. Og í flestu førum er hesin meiriluti kortini bert ein tingmaður. Skal tú hava eina samgongu, sum hevur stóran meiriluta aftan fyri seg tvs. einar 20 til 22 tingmenn, so mást tú seta saman ikki færri enn 4 til 5 flokkar. Hetta er ikki júst tað, sum tíðin í dag krevur av einum komandi løgtingi og landsstýri, har tað kanska er meira neyðugt enn nakrantíð at hava eitt stýri, sum er fført fyri at taka tær neyðugu avggerðirnar og sum tískil hevur hollan meiriluta aftan fyri seg. Vit hava ikki ráð til at skipa samgongur við alt ov nógv flokkum, tí vandi er fyri, at tær hava stutta livitíð. Og eitt val aftrat í ótíð vil vera bæði skomm og ein skandala.

EIN orsøkin til hesa mettu parlamentarisku støðu eftir valið er tann, at eingin av teimum "gomlu" stóru flokkunum far nakað stórt sigursval. Tað sýnist m.a. at vera ómøguligt hjá tveimum flokkum einsamøllum at fáa meiriluta. Sambandið, sum hevur verið spátt stórsigur í fyrrverandi veljarakanningum í upp til 12-14 tingmenn, fer eftir hesi seinastu kanningini "bert" at fáa 8 mans. Harafturímóti hava teir sokallaðu kristiligu flokkarnir tikið dik á seg og standa til at fáa 5-6 tingmenn. Eisini verkamannafylkingin stendur til at fáa einar tveir mans. Hetta sigur okkum so mikið, at semjast teir "gomlu stóru" flokkarnir ikki um at skipa eina samgongu, so fáa vit eina fleirflokkasamgongu við kanska 4 ella 5 flokkum, og tá verða teir smærru flokkarnir so tungan á vágskálini. Ein og hvør kann so gita sær, hvussu arbeiðslagið fer at vera í eini komandi samgongu!

AV royndum vita vit, at hetta ikki er nøkur heppin støða. Ein slík samgonga, sum stendur og fellur við stuðuli frá eitt nú "teimum kristiligu", hon fer at fáa nógvar trupulleikar at dragast við, tí hesir flokkar fyri tað fyrsta hava lovað so nógv uttan at vísa á, hvussu lyftini skulu fíggjast, og harnæst hava teir stevnuskráir, sum fleiri av hinum flokkunum als ikki kunnu góðtaka ella taka undir við. Hvør støðan hjá einum møguligum nýggja verkaflokki verður til eina komandi samgongu er eisini ilt at siga. Tann sannroynd at hesin flokkur í stóran mun er sprottin burtur úr ónøgd og nærum haturi til javnaðarflokkin og ávísar javnaðarpolitikarar ger tað neyvan lætt at fáa hesar flokkar í samgongu saman.

SOLEIÐIS sum vit síggja støðuna nú, so verður tað ringt at koma uttan um javnaðarflokkin í eini komandi samgongu. Ikki nokk við tí. Fer hesin flokkur at fáa eitt hampuligt val, so bendir nógv á, at hann verður flokkurin, sum eftir valið fer at leiða eina komandi samgongu við ella uttan sambandsflokkin. Tað er nevniliga so, at sambandsmenn hava gjørt javnaðarflokkin til sín høvuðsfígginda í valstríðnum - teir hava lagt eftir manninum heldur enn eftir bóltinum - hugsið bara um, hvussu framstandandi sambandsmenn nú í mánað eftir mánað í dulnevndum greinum í Dimmalætting hava svínað út navngivin javnaðarfólk - og tað kann hesin flokkur koma at svíða fyri, um hann ikki fær tað góða valið, sum honum varð spátt og sum valevni flokkins nú hava speglað sær í í málgagninum Dimmalætting í langa tíð. Tað er ilt at síggja, at sambandið skal vera serliga fegið bjóða javnaðarflokkinum í samarbeiði, nú sambandsfólk hava lagt so nógv eftir javnaðarflokkinum. Hetta nýtist sjálvandi ikki at hava nakran týdning eftir valið, men tónin hevur í hvussu so er verið alt annað enn appelerandi til eitt komandi samarbeiði.

VANLIGA er tað so, at flokkar, sum hava sitið við ábyrgd serstakliga í ringum tíðin, verða revsaðir av veljarunum við eitt val. Tí er rímuligt at rokna við, at javnaðarflokkurin fer at fáa eina ella aðra afturgongd. Men tað løgna er hent í hesum valstríðnum, og tað er, at andstøðuflokkarnir við sambandi og fólkaflokki á odda hava staðið seg ómetaliga illa. Teir hava ikki megnað at sannført teir annars ørkymlaðu veljararnar um, at teir eru besta boðið. Hetta kemur nú til sjóndar í veljarakanningini á tann hátt, at viðhaldsfólk teirra nú flýggja yvir til teir "kristiligu", og samstundis gongur kurvan hjá javnaðarflokkinum nú uppeftir aftur. Eftir frálíka avrikið hjá løgmanni og formanni javnaðarfloksins í Norðurlandahúsinum mikukvøldið er heldur eingin ivi um, at ein stórur partur av teimum 30%, sum enn ikki hava avgjørt, hvønn tey skulu velja, nú geva javnaðarflokkinum atkvøðuna.

SO stóru andstøðuflokkarnir hava bara sær sjálvum - sínum manglandi loysnum og ES-, lønarlækking- og avhøvding av tí almenna-politikki - fyri at takka, at teir nú møguliga ikki fáa nakað veruligt sigursval. Hvussu tá eftir valið! Hvør samgonga verður tann mest eyðsýniligakundi verið spurt! Javnaðarflokkurin hevur ikki undan valinum sagt nakað um, hvørja samgongu hann ynskir sær. Men eftir okkara tykki vil ein samgonga millum javnaðarflokk, tjóðveldið og so ein nóg stóran flokk aftrat - tó við undantaki av fólkaflokkinum - verða tann frægasta samgonguloysnin. Javnaðarflokkurin hevur bløtt nokk við samarbeiðinum við fólkaflokkin, at hann má ikki endurtaka tað samarbeiðið. Tá eigur hann heldur at fara í andstøðu. Men at tvinga samband og tjóðveldi í eina samgongu, har javnaðarflokkurin verður tann, sum skal byggja brúgv og seta út kósina, hevði kanska ikki verið tann vánaligasta loysnin í veranði støðu. Spurningurin tá verður um, hvat sambandið fer at siga til slíka samgongu. Sum teir ábyrgdarflokkar javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin eru, so fara teir ikki at seta føtur í spenni móti at taka sambandið við í eina trýflokka samgongu eftir valið. Men hon verður so ikki uppá sambandspremissur ella borgarligar premissur aleina, soleiðis um sambandið vildi tað eftir seinasta val.

TAÐ ræður nú meira enn nakrantíð um at loysa eina kreppu og leggja botn fyri framtíðina og til at loysa hesa uppgávu er neyðugt hjá øllum flokkum at slaka nakað upp á síni grundleggjandi sjónarmið. Nú at velja millum loysing og amtstøðu er sum val millum pest og kolera. Nettup tí er tað kanska meira neyðugt enn nakrantíð við einum javnaðarflokki til at vera tað liðið, sum skal til fyri at binda umrøddu ymisku flokkar saman í eini samgongu. Hetta er okkara boð - sjálvandi við seinastu veljarakanningini sum grundarlag.

SOSIALURIN

Ingeborg Vinther

Virðir ikki tey gomlu

Í valblaðnum fyri Vága valdømi herfyri í Sosialinum, var prát við 79 ára gamla Jóhannes Olsen í Sandavági, um tað at fakfelagsleiðarar hava stovnað Verkamannafylkingina.

Hann var formaður í Sandavágs Arbeiðsmannafelag til fyri stuttum, og nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag í nógv ár, eitt skifti sum formaður.

Jóhannes Olsen hevur sostatt innlit í fakfelagsmál sum fáur, og eisini - hann hevur loyvi at hava sína persónligu meining um Ingeborg Vinther, fakfelagsleiðara, sjálvt um tað kemur eitt sindur uppá tvørs hjá Ingeborg!

Í aftursavri í FF skrivar Ingeborg Vinther, at Sosialurin hevur leitað fram ymisk fólk, sum hava eitt hvørt ilt at bera Ingeborg og Óla.

Tað er so líkt Ingeborg, at hon leggur fólk undir líkt og ólíkt, tá okkurt verður sagt, sum ikki hóar henni.

Hesaferð er tað undirritaða hevur verið í Vágunum og leitað ein gamlan mann upp. Eg skilji tað, sum vil Ingeborg við hesum siga, at orðini hjá Jóhannes Olsen ikki standa til trúnaði, tí maðurin er 79 ára gamal. Hon heldur, at tað er synd í Jóhannesi Olsen, tí Sosialurin hevur lagt honum orð í munnin, sum ikki kunnu vera hansara egnu.

Ingeborg Vinther sigur seg annars at hava havt gott samstarv við Jóhannes Olsen.

Tað var ikki júst gott samstarv, sum Jóhannes Olsen hevði at bera Ingeborg Vinther, men lat tað fara.

Tað, sum harmar meg allar mest er, at Ingeborg Vinther greitt sipar til, at maðurin er so gamal, at hansara sjónarmið ikki eru eftirfarandi.

- Eg haldi tað vera langt úti av Sosialinum at brúka næstan 80 ára gamlar menn í hesi útspilling ímóti mær og Óla.

Væl vitandi, at Ingeborg Vinther bert góðtekur tað, sum hon vil hoyra onnur siga um hana, so noyðist konan at loyva fólki hava aðrar meiningar. Vit hava tali-og skrivifræsli í Føroyum.

Persónliga haldi eg, at Ingeborg Vinther við síni politisku herferð í seinastuni hevur gjørt sítt til at syndra fakfelagsrørsluna, og at hon í síni maktgirnd hevur givið tey tímaløntu í Føroyum upp til skutils.

- Men at *invalidera* ein gamlan mann, bert tí hann talar Ingeborg Vinther beint ímóti, tað er ómenniskjansligt.

Tað var gamalt í Føroyum, at vit høvdu virðing fyri teimum gomlu. Tey gomlu vóru vís, tey høvdu lívsroyndir, sum yngru ættarliðini kundu byggja víðari á.

Vil Ingeborg Vinther ikki taka við læru av sínum lívsroyndum, hvussu kann hon so verða ein fyrimynd fyri eftirkomarar sínar?

Sjálvssøkni Ingeborg Vinther í hesum máli ger einki hol í sjógvin, og boðar ikki frá góðum.

Dagny Joensen

Visti tú...
...at SMS FOTO hevur eina
Canon
lit-kopimaskinu, sum m.a. kann: vaksa og minka svart/hvítar og litmyndir í nærum allar støddir??
SMS FOTO
Tlf. 19820

VIKING
LOTTO
viku nr. 27, 07. juli
Vinnaratøl: 12 - 20 - 25 - 31 - 39 - 43
Eykatøl: 1 - 27 - 36
Prognosa:

6 vinnaratøl	3.179.845,-kr.
5 vinnaratøl + 1 eykatal	159.469,-kr.
5 vinnaratøl	6.802,-kr.
4 vinnaratøl	187,-kr.
3 v.tøl + minst 1 eykatal	58,-kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.